Høgni Hoydal:

# Allir møgu-leikar opnir



Flokkurin hevur ikki broytt støðu viðvíkjandi Anfinni Kallsberg.

Mynd: Jens Kristian Vang

**Støðan hjá Tjóðveldisflokkin til Anfinn Kallsberg er óbroytt. Høgni Hoydal trýr upp á nógvar samgongumøguleikar**

LØGTINGSVAL
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Høgni Hoydal var sera fegin um valúrslitið.

– Eg hevði øgiliga ymsar vónir til hetta valið. Eg kenni meg lætnaðan, tí hesin hevði eg ikki roknað, hóast eg fekk onkrar ábendingar um, at tað fór at ganga betri, enn valkanningarnar høvdu spátt, sigur Høgni Hoydal.

Hvat heldur tú um valúrslitið?

– Fyri fyrstu ferð hevur vallógin verið til okkara fyrimun. Hesaferð vóru marganalarnir á okkara síðu, sigur Høgni Hoydal, sum segði seg vera bilsna av tí stóra persónliga stuðlinum, sum hann fekk. Formaður Tjóðveldisfloksins heldur, at góða úrslitið fyrst og fremst kemur av tí stóra innsatsinum, sum tjóðveldisfólk hava gjørt kring landið.

– Vit hava sitið við leiðsluni í seks ár, og tikið nógvar illa umtóktar avgerðir. Tí tulki eg tað sum ein stóran sigur, at vit megnaðu at halda stand, sigur Høgni Hoydal.

Upp á fyrispurning um valllógin eigur at verða broytt, sigur Høgni Hoydal, at Tjóðveldisflokkurin er til reiðar at hyggja nærri at hesum møguleikanum

Hvørjir samgongu møguleikar sært tú útfrá úrslitinum?

– Her eru allir møguleikar opnir. Eg haldi, at vit hava nógvar møguleikar. Vit hava heldur ikki útihýst Fólkaflokkin, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur seg hava góðan hug at gerast løgmaður, men hann leggur dent á, at tað týdningarmesta er, at Tjóðveldisflokkurin kann vera við at mynda poltikkin næstu árini.

Og møguleikarnir fyri breiðum samgongum eru eisini til staðar. Avgerandi fyri um hetta ber til, metir Høgni Hoydal vera, um semjan kann finnnast um tey stóru málini, sjálvstýris-, fíggjar-, sosial- og vinnnupolitikkin.

Krevja tit, at Anfinn Kallsberg leggur frá sær?

– Okkara støða er ikki broytt í mun áðrenn valið. Vit vilja ikki ganga við til Anfinn Kallsberg sum løgmann ella landsstýrismann, um hann ikki gongur við tær treytir, sum vit settu honum, sigur Høgni Hoydal.

Tvinnu kostirnir hjá Anfinn Kallsberg er annaðhvørt at reinsa seg sjálvan í sambandi við skuldsetingarnar í málinum um Frostvirkið ella at biðja um umbering.

Sostatt er støðan eins fastlæst, sum hon var undan valinum.

Hvønn peikar tín flokkur á samráðingarleiðara?

- Tað vil eg ikki siga nakað um nú.

# Til viks um neyðugt

**– Tað mest avgerandi fyri Fólkaflokkin er at fáa okkara politik framdan í verki. Og tað ger mann bara, um mann kemur í samgongu. Persónsspurningar koma í aðru røð, sigur ein sera glaður, men troyttur, Anfinn Kallsberg aftaná løgtingsvalið**

*Kristian E. Andersen*
*kristian@sosialurin.fo*



Anfinn Kallsberg er til reiðar at seta seg sjálvan til viks um neyðugt

Mynd: Jens Kristian Vang

Anfinn Kallsberg fekk eitt øgiligt valúrslit. Við 819 persónligum atkvøðum setti hann met í Norðuroyggjum, og við tveimum eykavaldum megnaði Fólkaflokkurin at varðveita tann eina tingmannin, sum teir sambært ávísum veljarakanningum stóðu til at missa. Og Anfinn Kallsberg var sum vera man eisini ein glaður politikkari aftaná valið.

– Eg havi tað øgiliga gott beint nú. Kanska eitt sindur móður, men eg eri ótrúliga glaður fyri úrslitið. Bæði fyri meg persónliga og fyri flokkin. Hóast tann velduga ágang móti mær og flokkinum í seinastuni megna vit at halda skansan, sigur Anfinn Kallsberg.

## Nógvir møguleikar

Anfinn Kallsberg vil ikki siga nakað um, hvønn flokkur hansara helst ynskir at sleppa í samgongu við, og hann fjalir ikki, at har eru nógvir møguleikar.

– Eg vil ikki siga nakað konkret um samgongumøguleikar beint nú. Tað er givið, at har eru rættiliga nógvir møguleikar, um mann hyggur eftir tølunum. Bara hugflogið setir markið. Bæði ein breið og ein smøl samgonga eru møguligar, vísir Anfinn Kallsberg á.

## Seg sjálvan í aðru røð

Teir tríggir av hinum stóru flokkunum hava allir greitt meldað út, at teir fara ikki uppí eina samgonga, har Anfinn Kallsberg antin verður løgmaður ella landsstýrismaður. Spurdur um, hann ella Fólkaflokkurin finna seg í hesum, sigur Anfinn Kallsberg, at hann er til reiðar at seta seg sjálvan til viks um neyðugt.

– Tað mest avgerandi fyri Fólkaflokkin er at fáa okkara politik framdan í verki. Og tað ger mann bara, um mann kemur í samgongu. Persónsspurningar koma í aðru røð, sigur ein avgjørdur Anfinn Kallsberg at enda.






*Ein hugsunnarsamur Jóannes Eidesgaad í barnaheimi sínum á Tvøroyri valkvøldið, har hann situr og fylgir við útslitinum. Hann vann valið í Suðuroynni, men í sjálvari heimbygdini, Tvøroyri, tapti hann fyri Sverra Midjord*

# Slagið kemur at standa um sosialmál og vinnumál

**Formaðurin í javnaðarflokkinum væntar ikki, at ríkisrættarligi spurningurin fer at vera tann stóri trupulleikin, nú nýggj samgonga skal skipast**

LØGTINGSVALIÐ 2004
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað eru nógvir nøguleikar at skipa nýggja samgongu eftir løgingsvalið týsdagin.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins.

Men so er hann eisini nokk so vísur í, at júst javnaðarflokkurin verður lykilin til eina nýggja samgongu.

– Tingmannabýtið lagaði seg so, at tað er lítið sannlikt, at tað fer at bera til at skipa samgongu uttanum javnaðarflokkin, bæði tá ið vit skulu hava eina breiða semju um ríkisrættariligu støðuna ella um vinnumál og sosialmál.

Men tað hóvar honum eisini væl.

– Vit hava verið í andstøðu í átta ár og tað er leingi hjá javnaðarflokkinum. Tì er ikki yvir at dylja at vit vilja fegin í samgongu aftur, sigur formaður floksins.

Hann sigur, at tað eru bæði møguleikar at skipa eina stóra samgongu við trimum av teimum stóru flokkunum. Ein slík samgonga fer at hava 21 ella 22 tinglimir.

Tað ber eisini til at skipa eina smala samgongu við tveimum stórum flokkum og øðrum, ella báðum teimum lítlu flokkunum. Ein slík samgonga fær 17 ella 18 tinglimir og hevur sostatt onki at geva av, tí fyri at fáa meiriluta, krevjast 17 tinglimir.

Men Jóannes Eidesgaard er eisini sannførdur um, at tað fer at vera ógvuliga trupult at arbeiða hjá eini smalari samgonga við 17 ella 18 tinglimum.

– Ein stór samgonga hevði fingið tað munandi lættari, sigur hann.

Hinvegin væntar formaður javnaðarfloksins ikki, at tann ríkisrættarligi spurningurin verður størsti trupulleikin í royndunum at skipa samgongu.

– Í ríkisrættarliga spurninginum hava allir flokkar flutt seg nógv inn ímóti miðjuni so eg vænti at tað verður rættiliga skjótt, at flokkarnir kunnu semjast um, hvussu farast skal fram á tí økinum.

Hinvegin væntar hann, at tað stóra slagið fer at standa um, hvønn politikk ein nýggj samgonga skal føra á vinnuliga og á sosiala økinum.

Men at tosa um løgmann og málsøki er alt ov tíðliga enn.

## Ikki tikið støðu til samráðingarleiðara

Ein stórur spurningurin í hesum sambanhangi er, hvussu verður við Anfinni Kallsberg, skuldi tað hent, at fólkaflokkurin kemur í eina nýggja samgongu.

Undan valinum hevði javnaðarflokkurin ta avgjørdu støðu, at hann fór ikki í nýggja samgongu við Anfinni Kallsberg sum løgmanni ella landsstýrismanni, eftir tað, sum er komið fram um fortíð hansara.

Í dag er Jóannes Eidesgaard ikki heilt so avgjørdur.

Hann sigur, at tað eru tvey nýggj andlit í tingmanningini hjá javnaðarflokkinum (John Johannesen og Sverri Midjord) og tann spurningurin skal nú viðgerast í flokkinum.

Men tað skilst kortini á honum, at tað er lítið sannlíkt, tingmanningin broytir støðu.

– Skal Anfinn Kallsberg vera ein leiðandi politikari eftir valið, hevur ongin orsøk verið til at havt løgtingsval, tí tað var júst hansara støða í politikki, sum var orsøkin til valið, sigur Jóannes Eidesgaard.

Annars heldur hann, at úrslitið av valinum kundi givið okkum orsøk til at endurskoða vallógina, tí hesuferð vísir tað seg, at tjóðveldisflokkurin, sum er triðstørstur í atkvøðum, fær átta tingmenn, men at bæði sambandsflokkurin og javnaðarflokkurin, sum fingu fleiri atkvøður, fáa bara sjey tingmenn.

– Hetta er eitt úrslit av, at tann flokkur, sum vinnur tey smáu valdømini, kann gerast yvirumboðaður og hetta er hent fyrr.

Ì dag eru formenninir kallaðir saman til fundar og har skal ein floksformaður veljast til at standa fyri teimum fyrstu royndunum at skipa samgongu. Hann fær so tríggjar dagar at royna seg í. Eydnast tað ikki at fáa glið á, handar ein stafettina víðari til ein annan floksformann.

Javnaðarflokkurin hevur ikki enn avgjørt, hvønn hann fer at vísa á til samráðingarleiðara.

## Stóra afturgongd

Annars var úrslitið av valinum hjá Jóannesi Eidesgaard sjálvum ikki serliga sannførandi, í hvussu so er ikki í heimbygdini, Tvøroyri.

Tilsamans fekk hann 403 atkvøður í øllum valdøminum.

Tað eru 100 færri enn seinast, tá ið hann fekk 503. Men á valinum í 1998 fekk hann heilar 709 atkvøður.

Eisini á Tvøroyri hevði hann stóra afturgongd. Á seinasta løgtingsvali fekk hann 327 atkvøður á Tvøroyri, men hesuferð fekk hann bara 262 atkvøður. Tað førdi so aftur til, at verteranurin, Sverri Midjord, yvirhálaði hann í heimbygdini.

Men Jóannes heldur seg kennna orsøkina til hesa gongdina.

– Ì fyrsta lagi er veruleikin tann, at eg eri ikki so nógv at síggja á Tvøroyri longur, tí alt tað politiska arbeiði er í Havn, so tað er har, at eg eri fyri tað mesta.

– Í øðrum lagi skerst ikki burtur, at nógvir veljarar halda, at eg havi verið sjálvskrivaður á ting av tí, at eg eri formaður floksins og tí hava tey heldur vilja sett krossin við onkran annan.

– Og í triðja lagi skerst heldur ikki burtur, at í ár hevur sera hørð kapping verið ímillum Sverra Midjord á Tvøroyri og Henrik Old í Vági um annan tingsessin hjá javnaðarflokkinum í Suðuroy og tað hevur uttan iva ført við sær, at tvørafólk í ein ávísan mun hava tikið seg saman um Sverra Midjord fyri at fáa tvey umboð av Tvøroyri.

Annars leggur Jóannes Eidesgaard dent á, at hann er væl nøgdur við valið í Suðuroynni sum heild, tí javnaðarflokkurin er so nógv størsti flokkur í oynni við heili 41,9% av atkvøðunum. Tað er ein framgongd upp á 0,7% afturímóti valinum í 2002.

# Flokkarnir til løgtings formannin

**Edmund Joensen, tingformaður, hevur boðað flokkunum frá, at teir skulu koma til hansara at peika á ein samráðingarleiðara**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Løgtingsformaðurin hevur boðað flokkunum frá, at hann vil hava teir at koma til sín í dag, hósdagin, til tingformansumfar.

Her skulu flokkarnir peika á ein samráðingarleiðara, sum skal royna at skipa samgongu.

Flokkarnir peika hvør í sínum á ein samráðingarleiðara. Tað er síðani tann, sum í tingmonnum hevur størstan stuðul, sum sleppur at royna at skipa samgongu. Hetta merkir, at flokkarnir sum so hava eins nógvar atkvøður sum tingmenn.

Anfinn Kallsberg hevur lagt frá sær, og tískil er støðan ikki sum eftir seinasta val, har hann sat í løgmansembætinum orsakað av fastlæstu støðuni.

Edmund Joensen sigur tó, at ynskja flokkarnir at fáa meira tíð at umhugsa seg, so fáa teir tað.